# Børn og foreldur á Tvøroyri fáa munandi betri umstøður

**Næsta ár tekur Tvøroyrar Kommuna eitt stórt tak fyri at bøta um barnaansingina**

BARNAANSING

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú skulu børn á Tvøroyri og foreldur teirra hava munandi betri umstøður.

Tað hevur Tvøroyrar Býráð samtykt.

Býráðið á Tvøroyri er í løtuni í ferð við at leggja fíggjarætlanina fyri næsta ár og í hesum sambandi hevur býráðið samtykt at fara undir rættiliga stórar útbyggingar á ansingarøkinum.

Sostatt hevur Býráðið samtykt at brúka eina milliónt til at byggja barnaansingina út fyri.

Peningurin skal brúkast til at byggja barnagarðin út fyri.

Tvøroyrar Kommuna hevur leingi verið rættiliga væl fyri á barnaansingarøkinum og hevur raðfest økið so mikið ovarliga, at í nógv ár hevur ongin bíðilisti verið til at sleppa í ansing.



*Barnagarðurin á Tvøroyri skal nú byggjast út, so at pláss verður fyri 20 børnum afturat. Harafturat skal felagshøli gerast til dagrøktina, so at øll barnaansingin er savnað á einum staði*

Og hetta økið skal raðfest enn hægri tey næstu árini.

– Samstundis hava vit staðfest, at nú er ein ávísur bíðilisti til frítíðarskúlan, men tað kemst av, at alsamt eldri børn sleppa í frítíðarskúla eftir vanliga skúlatíð, sigur Kristin Michelsen, borgarstjóri á Tvøroyri.

Harafturat er stórur bíðilisti eftir at sleppa úr dagrøktini á Tvøroyri í barnagarðin.

Tí fer býráðið næsta ár at byggja barnagarðin út, so at pláss verður fyri 20 børnum afturat teimum næstan 50, sum pláss eru fyri nú, fulla tíð.

Í Dagrøktini eru 46 fulltíðarpláss, umframt 18 pláss í Hvalba, sum samsarvar við Tvøroyri um dagrøktina.

Tá ið barnagarðurin verður bygdur út, skal felagsrúm gerast í barnagarðinum til dagrøktina, so at alt smábarnaøkið verður savnað í einum staði. Dagrøktarmammurnar hittast við børnunum fast ein dag um vikuna og tað skal felagshølið brúkast til.

Higartil hava dagrøktarmammurnar hitst í einum hølum í kjallaranum í skúlanum í Trongisvági. Men dagrøktin skal hava nýggj felagshøli í barnagarðinum, er ætlanin at frítíðarskúlin skal fáa hølini í kjallaranum í skúlanum í Trongisvági afturat.

Sostatt fær eisini frítíðarskúlin betri umstøður so at børn úr triðja flokki og kanska enn eldri, eisini kunnu sleppa í frítíðarskúla. Í løtuni er pláss fyri gott 20 børnum í frítíðarskúlanum, men tá ið hann er bygdur út, verður pláss fyri 50 børnum í frítíðarskúlanum.

Tá ið børnini vilja sleppa úr dagrøkt yvir í barnagarðin, eru útlit til, at dagrøktin verður niðurlagað.

– Hinvegin kunnu dagrøktarmammur vænta at fáa størv í barnagarðinum tá ið hann verður útbygdur, sigur borgarstjórin.

Tilsamans fer Tvøroyrar Kommuna sostatt at brúka 8,7 milliónir til barnaansing næsta ár.

# Vágbingar fara nú at tosa við onnur um framtíðina



*Í næstu viku fer Kirstin Strøm Bech, borgarstjóri í Vági, at senda hinum kommununum í syðru helvt í Suðuroy fundarboð at tosa um víðkað samstarv - og kanska eisini um samanlegging*

**Kommunurnar í syðru helvt í Suðuroy fáa nú fundarboð frá vágbingum at tosa um framtíðina**

KOMMUNUR

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú ætlar Vága Býráð sær rættiliga at seta hol á framtíðina.

Og tað ætlar býráðið sær at gera við at tosa við hinar kommunurnar í syðru helvt í Suðuroy.

Vágs Býráð hevði framtíðina hjá Vágs kommunu til umrøðu í gjárkvøldið.

Býráðið tók málið upp í kjalarvørrinum á teirri fólkaatkvøðu, sum var í Vági 2. desember um støðuna hjá Vágs Kommunu í framtíðini.

Fólkaatkvøðan vísti, at tepur meiriluti var fyri, at varðveita Vág sum sjálvstøðuga kommunu.

Men skulu kommunur í Suðuroy leggjast saman, var stórur meiriluti í Vági fyri at Suðuroy verður tvær kommunur.

Og tað var hendan sannroyndin, sum Vágs Býráð skuldi taka støðu til í gjárkvøldið.

Tað, sum Vágs Býráð skuldi taka støðu til, var sostatt, hvat úrslitið av fólkaatkvøðuni skal brúkast til.

Og niðurstøðan er, at Býráðið er samt um, at tosa við hinar kommunurnar í syðru helvt í Suðuroy um at víðkað samstarvið ímillum tær.

Tær kommunur, sum Vágs Býráð nú fer at seta seg í sambandi við, eru Sumbiar Kommuna, Porkeris- og Hovs Kommuna.

Og nú kommunurnar í Suðuroyar syðru helvt fara at tosa um økt samstarv, skulu tær eisini kanna møguleikan at seta ein arbeiðsbólk at lýsa fyrimunir og vansar við at leggja syðru helvt í Suðuroy saman í eina kommunu.

Kirstin Strøm Bech, borgarstjóri, sigur, at innbjóðingarnar til hinar kommunurnar, verður helst send í næstu viku, men fundurin verður neyvan fyrrenn í januar.

### Full semja

Hetta var ein avgerð, sum full semja var um í Vágs Býráði.

Býráðslimir vóru kortini eitt sindur ójavnir á máli um, hvussu úrslitið av fólkaatkvøðuni skuldi tulkast.

Summir býráðslimir staðfesti, at meiriluti hevði verið fyri, at Vágs Kommuna skal framhaldandi vera fyri seg sjálva.

Og teir staðfestu eisini, at býráðið hevur lovað at úrslitið av fólkaatkvøðuni skuldi virðast.

Aðrir býráðslimir høvdu hug at skilja úrslitið øðrvísi.

Teir mettu, at ætlanin hjá landsstýrinum um sjálvbodna kommunusamanlegging, fer at enda við, at kommunur verða tvingaðar at leggja saman, so ella so.

Og teir tulkaðu fólkaatkvøðuna so, at stórur meiriluti er í Vági ímóti at leggja alla Suðuroy í eina kommunu.

Tí mettu teir, at tað var rætt at Vágs Býráð longu nú tekur málið upp og tekur málið til viðgerðar fyri at standa sterkari brynjað, tá ið kravboðini um samanlegging verður. Tí hildu teir, at tað var rættast longu nú at tosa við hinar kommunurnar í syðru helvt í Suðuroy um at leggja saman.

Ført varð fram, at kommunur í syðru helvt samstarva um skúla, lækna, barnaansing og onnur øki.

Men býráðslimir hildu eisini, at kommunurnar áttu at funnið semju um, hvussu útbyggingar í syðru helvt í Suðuroy skulu gerast og, hvar tær skulu vera, tað verið seg felags barnagarður, bátahylur, ídnaðarøkið o.s.fr.

### Fara at tosa

Borgarstjórarnir í Sumba, Porkeri og Hovi, hava fyri kortum sagt fyri Sosialinum, at kommunustýrini hava ikki tikið endaliga støðu til kommunusamanlegging. Og teir søgdu eisini, at koma fundarboð úr Vági, um samstarv ella um at leggja syðru helvt í Suðuroy í eina kommunu, fara tey uttan iva at tosa við vágbingar.

Men teir ivast í, um hetta førir til nakað, tí hóast bygdaráðini ikki hava tikið formliga avgerð um samanlegging, er tað teirra egna meting, at ongin hugur er til at leggja saman, uttan so, at øll Suðuroy verður løgd í eina kommunu.

**Í Vágs býráð varð "Einmælt samtykt at Bjóða kommunum í Suðuroyar sunnaru helvt til fundar um víðkað kommunusamstarv og eventuelt, saman, niðurseta ein arbeiðsbólk, sum skal útgreina fyrimunir og vansar við at leggja kommunurnar saman"**

*Hetta er orðarætt tað, sum Vágs Býráð samtykti í gjárkvøldið í kjalarvørrinum á fólkaatkvøðuni 2. desember um framtíðina hjá Vágs Kommunu*